Sansalig totaluppliving

Sjónleikurin: "Úlhams Søga"
Leikstjóri: Maria Ellingsen
Leikmynd: Snorri Freyr Hilmarsson
Búnar: Helga I. Stefánsdóttir og Bergtóra Magnusdóttir
Ljósseting: Bjørn Bergstein Guðmundsson
Tónleik: Eivør Pálsdóttir

UMMÆLI
Dagny Joensen

Tá palltjaldið, sum ikki var har, fór frá í Norðurlandahúsinum, har leikurin »Úlfhams Søga« var sýndur fyrstu ferð hóskvøldið, fóru leikarar undir ein leik við rytmiskum tónum, dansi - og taluframførslu, sum setti áskoðararnar aftur í frumtíðina, samstundis sum hann førdi okkum inn í framtíðina við síni skapandi megi.

Leikurin er í innihaldi sum ein hvør menniskjanslig søga, har tað góða berjist við tað ónda. Ein søga um kærleik og hatur, um at vinna vald, gand og yvirtrúgv, bardaga og vónloysi.

Pallmyndin er sera einføld í fyrstuni. Tríggjar beinarøðir hanga undir loftinum og á pallinum ein hálvkúla, sum í leikinum kann vera jarðarknøtturin, men eisini valkyrjaheyggurin, har tær vápnaðu moyggjarnar hjá Óðini valdu teir út, sum skuldu doyggja í bardaga.

Einfalda pallmyndin verður sum frálíður til ein listarliga uppliving, sum í sjálvum sær er nóg mikið til, at áskoðarnir hava úr at gera við at eygleiða nýggjar pallmyndir, sum daga undan her og har, so hvørt sum leikur fer. Alt hetta er undirbygt av eini ljóð- og ljósførslu, sum vit ongantíð áður hava hoyrt ella sæð í Føroyum. Hartil komu pallbúnarnir, sum saman við øllum hinum settu dám á leikin, so tú hugsar, at hetta eins væl kundi verið um indiánarnar í Ameriku, ella samuraiar í Japan, sum um íslendska søgn - menniskjuni eru menniskju allastaðni.

Eivør var grundarsteinurin

Fyrsti leikarin trínur fram á pallinum í nútíðarklæðum og blakar jakkan. Aftan á hann dagar Eivør Pálsdóttir sum ein frumkvinna fram úr tokutámi og leggur til brots við síni sermerktu, gandakendu rødd og rýtmum, sum heldur leikinum uppi teir tveir tímarnar leikurin er.

Síðani fer Eivør Pálsdóttir til viks á pallinum, har eitt nú trummur og onnur ljóðføri standa. Tú hugsar, at gøtugentan er høvuðsleikari, hóast hon situr myrkaløgd á síðulinjuni.

Fyri nærum fullsettum sali fer leikur fram, og neyvan hoyrist eitt kis í salinum, hóast fleiri børn vóru áskoðarar. Øll sótu sum rúnarbundin og eygleiddu tað, sum fór fram á pallinum. Kanska noyddust áskoðararnir at miðsavna seg um taluna, av tí at hon var framførd á íslendskum máli, sum ikki allir føroyingar eru so kringir í.

Tað sakaði tó einki, av tí at leikarnir við sínum kropsrørslum søgdu søguna so væl, eins og fylgitónleikurin og røddin hjá Eivør var grundarsteinurin í søgugongdini.

Dramatisku hendingarnar vóru í nógvum førum ógvuliga stórfingarnar og framførdar við teatralskum rørslum og røddum, sum bert íslendingar til fulnar megna, uttan at tað tó kennist uppgjørt.

Íblástur til okkara listaumhvørvi

Tað er fyrstu ferð í okkara leikumhvørvi, at vit hava verið áskoðarar til eina totalframførslu. Oftani verður sagt, at veruligalist er hon, sum verður til í løtuni, og sum ikki kann endurskapast. Tað er bert løtan sum telur, um tað skal hilnast. Tað var henda framførslan besta dømi um.

Ivaleyst vóru nógvir áskoðarar komnir at hoyra Eivør Pállsdóttir, tí hon hevur nógvar trúgvar fjepparar her á landi. Tað er ótrúligt sum hennara rødd spennir víða og hvussu góð empatisk evnir hon hevur at liva seg inn í søgugongdina við sínum tónasnildi.

Tað hevur ivaleyst heldur ikki gjørt uppgávuna minni áhugaverda, at Maria Ellingsen, leikstjóri, hevur mammu úr Føroyum. Tær báðar hava tað til felags, at tær hava røtur í Føroyum og kunnu á sín serstaka hátt byggja brúgv millum londini bæði.

Samanumtikið ein hugtakandi uppliving, sum vónandi gevur okkara leiklistaumhvørvi íblástur.

KOYRISKÚLI

Yamarin bátar

Yamarin 4410
Við Yamaha 20-40hk

Longd 435 cm
Breitt 180 cm
Vekt ca. 300 kg

Yamarin 5820
Við Yamaha 80-150hk

Longd 573 cm
Breitt 220 cm
Vekt ca. 740 kg

YAMARIN POWERED BY YAMAHA
P/F ALMA
Á Hjalla 15 – Hoyvík
Telefon 31 58 90
Telefax 31 04 68
Mail eli@alma.fo

Les meira á
www.yamaha-motor.dk